# Keeping the wheels of industry turning at sea and ashore

**At KBI they have a wide variety of industrial tools and equipment for marine and onshore purposes. Although the economy is in recession, they have enough work**



KBI in Klaksvík has participated in all previous exhibitions and will also attend "Fish Expo Faroes 2009", which opens on Wednesday morning and will continue over the next three days.

-"Our main objective of attending an exhibition such as this one, is to meet our clients/customers face to face – and of course present a selection of our goods", says Mr Karl Birgir Isaksen, the company CEO - and at KBI, they have much to offer.

They have such prodigious selection of industrial goods, equipment and tools, that they must be reckoned as a significant marine and shore-based supplier.

-"What we supply is equipment, goods and tools to vessels, fish factories, tradesmen and other shore-based industries. It will be a selection of these items we will bring to Tórshavn for the exhibition, says the CEO.

There will also be some new news from KBI this year.

-"One aspect we will demonstrate is a wide selection of new tools intended to mount and remove ball-bearings".

Apart from this, they will have on show various oils, welding equipment, chemicals, soaps and other services intended for vessels. Tools for cleaning, hovering, foam installations for fish plants, etc.

Mr Isaksen is very pleased that the exhibition has been relocated into Tórshavn.

-"I expect the relocation into an urban area will provide an additional dimension", says the KBI Managing Director.

He believes it will be easier for people to visit an exhibition, located in the middle of town and he is expecting more visitors to the exhibition compared to last year, when it was located "Uppi á Hjalla".

More detailed information on KBI can be accessed at www.kbi.fo

Mr Karl Birgir Isaksen is very pleased although there is a recession and he is quite satisfied that the exhibition has been relocated into urban Tórshavn.



*Mr Joel undir Leitinum, Managing Director at Samskip is quite satisfied with developments, although a head wind is blowing at the moment.*

## Halda gongd í vinnuni á sjógvi og á landi

**Á KBI hava tey eitt stórt og fjølbroytt úrval av amboðum og útgerð til vinnulívið á sjógvi og landi og hóast stígur er komin í búskapin, hava tey nóg mikið at gera**

KBI í Klaksvík hevur verið fastur fusur á teimum fiskivinnufamsýningum, sum hava verið og teir vera aftur við á "Fish Expo Faroes 2009", ið fer av bakkastokki mikumorgunin og verður opin tríggjar tær næstu dagarnar.

- Okkara fremsta endamál við at fara á eina stevnu, sum hesa, er at hitta okkara viðskiftafólk andlit til andlits – og so sjálvandi at vísa eitt úrval av okkara vøru, sigur Karl Birgir Isaksen, stjóri.

Og hjá KBI hava tey nógv at vísa fram.

Tey hava eitt so mikið stórt úrval av vøru, útgerð og amboðum, sum hava við vinnu at gera, at tey mugu siga at vera ein týðandi veitari bæði á sjógvi og landi.

- Vit hava útgerð, vørur og amboð til skip og fiskavirki, handverkarar og aðra vinnu á landi og tað verður eitt úrval av hesum vørum, vit taka við okkum til Havnar á framsýning, sigur stjórin.

Og har eru eisini okkurt nýtt at frætta frá KBI í ár.

- Eitt, sum vit fara at vísa, er eitt stórt úrval av nýggjum amboðum til at seta legur í og at taka legur úr aftur.

Umframt hetta, fara teir at vísa oljur, sveisiútgerð, kemisk evni, sápur og aðrar tænastur til skip, umframt amboð til at reingerð, dustsúgving, skúmanlegg til flakavirki og annað.

Karl Birgir Isaksen fegnast um, at fiskivinnuframsýning er flutt oman í Havnina.

- Eg vænti, at tað fer at geva nakað eyka, at framsýningin er flutt í bygt øki, sigur stjórin á KBI.

Hann heldur, at tað er uttan iva lættari hjá fólki at støkka inn á gólvið á eini framsýning, sum er mitt í býnum og tí væntar hann, at tað verða fleiri fólk á framsýningin í ár, enn tað vóru seinast, tá ið hon var uppi á Hjalla.

Annars fæst meiri at vita um KBI á www.kbi.fo